Til veljarar í Froðbiar sókn!

Hin 10. des. verður sóknarstýrisval á Tvøroyri.

Ikki bara nýggir menn skulu veljast, men nýggjur meiriluti, um væl skal vera í sóknini.

Hetta megu allir viðganga, tá ið vit hyggja afturum bak og siggja, hvat ið hent er, hvussu stýrt er í farnu 4 árunum.

Javnaðarmenn vunnu meirlutan, fingu 3 menn inn á høvuðslistanum. Ein serlisti varð stillaður av nokrum javnaðarmonnum. Sjálvandi var meiningin, at maður, sum kom inn á hesum lista sum javnaðarmaður, skuldi arbeiða saman við javnaðarmonnunum, sum komu inn á høvuðslistanum.

Tollarin Einar Larsen kom inn á serlistanum!

Hann hevði gingið undir orði at verið javnaðarmaður og varð sum slíkur av teimum stillandi javnaðarmonnunum settur á listan.

Men nú hendi tað harmiliga:

Einar Larsen gjørdi sum ædan: dreit í egið reiður!

Hann leyp yvir til andstøðumenninar afturfyri at verða borgmeistari annaðhvørt ár í skifti yvir tjóðveldismannin Hemming Jespersen við ti endamáli at leggja móti javnaðarmonnum og verja teir stóru, fyrst og fremst harra og arbeiðsgevaran hjá Hemmingi Jespersen, men ikki bara honum, men eisini várkunnara og hjálpara Einars Larsens.

Henda soleiðis samansjóðaða borgmeistaragreipa fór so til arbeið ið við hinum tænarum aftanfyri seg

Ov drúgført verður at rokna upp oll »kappabrøgd« teirra fyri stórmannin, stórmenninar. Fólkið á plássinum kenna tey. Men kortini skal eg taka í summi tey grefligastu.

TEIR STUNGU ÚTRÓÐRAMANNIN Í BAKIÐ

Prísnevndin hevði sett ein feskfiskapris fyri allar Føroyar.

Hann galt sjálvandi eisini fyri Tvøroyri.

Men hvat gjørdi stórmaðurin N. J. Mortensen, arbeiðsharri nakrar av sóknarstýrislimunum innan fyri teir borgarligu?

Hann noktaði at boyggja seg fyri prisavgerðini hjá nevndini, høast allir aðrir, ið keyptu fisk, boygdi seg. Hann segði nei og loyvdi sær at geva ein munandi lægri pris!

Útróðramenninir mótmæltu og vildu sjálvandi ikki lata fiskin fyri undirprisin. Stríðið og toganin vardi leingi. Hetta stendur sjálvandi øllum í friskum minni.

Útróðramenninir leitaðu sær hjálp hjá sóknarstýrinum. Ikki var tað nógv, ið teir ynsktu av býarstýri sínum. So vitt mær kunnugt var tað einans veðhald fyri nokrum fáum túsund krónum til skip at sigla niður við fiskinum, sum altso »fsvirkið« hjá N. J. Mortensen, a/s, ikki vildi geva ásetta prísin fyri.

Eingin útróðramaður ella nakar annar ivaðist í tí, at sóknarstýrið fór at ganga útróðramonnunum á møti.

Men tá ið uppskotið hjá javnaðarmonnum í sóknarstýrinum um hjálp til útróðramenninar kom fyri, boygdu Hemming Jespersen, Einar Larsen við sínum borgarligu fylgismonnum høvdið fyri harraboðunum og stemmaðu ikki fyri hjálparuppskotinum frá javnaðarmonnum.

Har stóðu útróðramenninir stungnir í ryggin!

Tá ið útróðramenninir bóðu táverandi formannin um at koma á fund við teir fyri at greiða teimum frá, hví borgarligi meirlutin hevði svikið teir, virdi hann Einar Larsen teir ikki so frægt sum at koma á fund — ella var samvitskan so ring, at hann ikki tordi at siggja þsínar menn« í eyguni?

Hvørjir eru teir arbeiðmenn og útróðramenn, sum kunnu fáa seg til nú við fyristandandi val í sóknini at velja listar við hesum somu monnunum Einari Larsen og Hemmingi Jespersen á?

Eg dugi ikki at fata tað, um nakar ger tað!

HVÍTANES, OGN KOMMUNUNNAR, OG ATBURÐURIN HJÁ TEIMUM BORGARLIGU

Tað eydnaðist javnaðarmeirlutanum at ogna kommununi Hvítanes við húsum og lendi. Roynt varð at fáa løgtingspening til at gera húsið í stand, men sum menn minnast leyp Hemming Jespersen fram á tingi sum óður maður imóti hesum og spilti húsið út, at vera rotið og komið at detta niður! Vøkur gerð!

Men hvat gjørdi hann so sjálvur saman við Einari Larsen og teirra monnum?

Tá var húsið so sanniliga ikki rotið!

Hann og teir loyvdu sær at offra stórpening uppá húsið og Hvítanes ognina fyri at leiga tað heila fyri langar tíðir fyri eina undirskotsleigu, sum Reinhold Silá í blaðgreinum sínum uppgav at liggja við einum árligum undirskoti uppá ikki minni enn 25.000 kr., sum skattgjaldararnir skulu rinda.

Bryggjuna niðan fyri gjørdu teir úr træ fyri 100 pst. útreiðslu fyri kommununa, høast hon kundi verið gjørd við 75 pst. studningi av peningi, sum javnaðarmeirlutin framanundan hevði fingið til vega til ábøtur av havnarlagnum!

Slíkt ábyrgdarloysi kann ikki forsvarast!

Teir, sum gera tilikt megu ikki sleppa nærhendis nokrum almennum aftur!

Neystakeypini, keypið av vegalendi til grótútkastið og 1½ — 2 millióna grundstykki til eitt flakavirki til mann, sum hevur ov mikið av strandøki og harímillum nógv betri liggjandi oki til formálið og bíligari í nýtslu.

Allir søknarbúgvarnir kenna, hvussu ið her liggur fyri. Her torvar tí bert í hesum døgum framanfyri valunum, ið nú skulu fara fram, at minna á orskapin, ið her er komin til sjóndar.

Hesir orskapur hevur verið so ágangandi hjá fólki, at eingin minni enn sjálvur formaðurin fyri tjóðveldisfelagið her á plássinum, harra Tóri Jóansson, lærari, hevur gingið í húsini við mótmælisadressu, ið ikki javnaðarmenn, men leiðandi kreftir innan fyri teir borgarligu høvdu skrivað.

Hetta sigur meiri enn langar greinir, hvussu langt, ið orskapurin hjá hesum borgarliga meirluta og tænara stórmanna er útviklaður!

Óneyðugt uttan nakra roynd til ekspropiasjón leggja teir á borðið 40 kr. fyri lendi til »blindtarmsveg« til grótkastið, flyta 3 neyst á leigugrund frá bygdini, seta monnunum upp aftur 3 brænnýggj og í allar máttar betri neyst og skjeyta teimum grundstykkinj keypt fyri 40 kr. m² økeypis til ognar. Og sum rosinina í pylsuendanum leggja teir tí eina manninum, tí mest morðgiriga 5000 kr. oman á rokan, høast hann ongan framihjárætt átti. Hinir báðir nevstaeigararnir kunnu væl ikki annað enn vera í øðini. Men tað tað er rimiligt munur á Jørgen hattamakara og kongi Salomon!

Alt saman um tikið verða vegur, neyst, lendiskeyp og grótkastið út í fjørðin til flakavirkisgrundina at liggja um ella helst oman fyri tær tvær milliónurnar. Økið er so longu burturleigað við ongari byggiskuld tey fyrstu 4 árini fyri 8000 kr. um árið. Hongur kommunan uppá helm ingin av teimum tveimum milliónunum, dugir hvør smádrongur at rokna út undirskotið, um rentan er 8 pst. og afturrindingartíðin 15—20 ár:

Rentan	kr.	80.000
Avdráttur (20 ár!)	kr.	50.000
Tilsamans	kr.	130.000
÷	kr.	8.000
Undirskot árliga	kr.	122.000

Sleppur kommunan við at rinda ¼ av kostnaðinum (studn. 50 pst. frá løgtingi og 25 pst. frá státi). Verður undirskotið tað hálva, altso **kr. 61.000.-**

Leigumál við Hvítanesi undirskot 25.000,- kr. og við »Grótkastinum« undirskot 122.000,- ella kr. 61.000,- — tað má sigast at vera rekordin í óforsvarligheit. Ikki løgið at partamaður Hemming Jespersen gongur inn í húsini við mótmælisadressu við kravi um at fáa landsstýrið at taka sær av hesum óðamannaleiki!

Javnaðarmenn hava altið verið við til at styðja virkis- og framtakshug. Men tað skal vera skil til stoðis. Varð fylgt javnaðarmanna ráðum og stoðu vildi peningurin til vega- og neystakeyp og flyting og »brokafylling« til spekulantarnar verið spardur. Hann og allur peningurin, ið fer til »grótkastið, verið nýttur til útdýpan av hylinum inni við land undir har, ið flakavirkið kundi verðið sett sum framhald av tí fyri stuttum bygda »milliónhúsi«, ið fyri ein part nú stendur fyri einki, men sum óivað kundi lagst inn í flakavirkisplánirnar, og hesir høvdu kanska nú verið fullførdir ella staðið fullførdir, tá útdýpingin og atleggingin í hylinum inni við land var gjørd liðug at nýta hjá øllum fiskiveiðiførum til samarbeiðis við flakavirkið.

Um pláss var kundi ein sum ibúgvi á plássinum og við upplýsingum frá teimum sera áhugaverdu frágreiðingum í Sosialinum av sóknarstýrislimi Reinhold Silá hild ið fram lýsing av tí syrgiliga skili, sum hevur rátt í kommununi undir harrunum Hemmingi Jespersen og Einari Larsen við borgarliga fylgismonnum sínum. Men góðu veljarar, tað skuldi verið nóg mikið við hesum til at sýnt tykkum, at nú er stundin komin at skifta hetta stýri út við góðar menn, sum hava sýnt ábyrgd og skilagóða leiðslu av teimum kommunálu viðurskiftunum.

Vit vistu við løgtingsvalið á Tvøroyri, at her eiga vit eina javnaðarsinnaða veljarafjøld. Sama eiga vit at gera við fyristandandi sóknarstýrisval.

Fylkist nú við valbørðið, kvinnur og menn, og latum okkum við fullum huga seta krossin við javnaðarlistarnar til sóknarstýrið, líkningarnevnd og skúlanevnd. Vit hava so vissu fyri, at sóknin verður væl stjórnað, og at »greyturin« í sóknar stýrinum verður sílaður.

Latum okkum seta teir menn í sessirnar, ið áður hava vist, og sum aftur vilja vísa, at teir seta veljarar nar og sóknarinteressurnar hægst.

Í Trongisvági, tann 19. nov. 1966.

Svend Jensen.

EFTIRSKRIFT:

Hetta stóra milliónhavnaarbeiði hava teir Hemming Jespersen, Einar Larsen og fylgisneytar uttan útboð og prískapping givið einum felag at projekterað og gera fyri rokning. Ikki so frægt sum smáarbeiðini við vegagerð og neystaflyting er loyvt okkara bygdarinnar heimligu dygtugu monnum at vera við í kapping ella arbeiðsleiðslu. Fakmaður, sum fyri dygd sína hevur vunnið sær hitt besta ummæli ikki bara her í sóknini, men langt uttan fyri pláss okkara, sum velur hesar menn, sum settu okkara egnu í skammikrók, sum um teir ikki vóru verdir at teljast millum menn?

Meg lystir at siggja teir menn, sum kyssa »boðlahondina!«

Og hvat siga tit veljarar til, at Hemming Jespersen, Einar Larsen og felagir í sóknarstýrinum veruliga hava samtykt at avreiða atkvøðurættin, ið knýtir seg til tær 165.000 kr. sum kommunan hevur sett í sleipistoðuna, — avreitt hann til ongan minni og betri enn til sama Hemming Jespersen, Niels Juel Mortensen, a/s og líkar. Er hetta ikki hitt grimasta yvirgangsverk, ið sóknarstýrislimir nakran tíð hava loyvt sær at útint sum sóknarstýrislimir!!

S. J.

TE líturin
TE bragdið
LYONS
TE angin
Quick
Brew
361-02
Aðalumboð: eysturoyar heilsøla

LUNDBERGS HJØRNE



Motion og sukkersyge

DET er et hjerte, jeg har fortalt om for nogen tid siden. Men som presser sig på, når man skal vurdere masalerne i trædemøllen, som jeg skrev om forleden. De masaler, der spiste helt forkert: Kun kød, blod og fed mælk. Men som alligevel havde lave kolesteroltal og ingen hjerteblodpropper.

Dem slipper de for, fordi de åbenbart ikke forkalker. Men også at en anden grund.

Hjertet, jeg har omtalt før, tilhørte nemlig en maratonløber. En mand, der blev ved at løbe, til han var langt op i 60'erne — da han døde af kræft.

Hans hjerte blev dissekeret, med det sære resultat, at det var nogenlunde så forkalket, som hjerter plejer at være i den alder — i velfærdsstaten altså.

MEN selv om hjertets egne arterier var mærkede af forkalkningsprocesserne, var det ikke gået ud over muskulaturen. Den var sund og god.

For maratonløberens veltrænede hjerte havde større lysning i disse arterier end normalt. Der løber jo temmelig meget blod gennem dem under et maratonløb.

Desuden var der flere og mere åbne indbyrdes forbindelser mellem de arterier, der forsynede forskellige gebeter. Så selv om en eller anden gren skulle gå hen og lukke sig, var chancen for blodforsyning ad anden vej så meget større.

Det var altså ikke noget tilfælde, at den hjertemuskulatur så sund ud. Den var blevet godt forsynet.

NÅR masalerne ikke får hjerteblodprop, skyldes, det altså ikke bare den ringe forkalkning — som kolesteroltallet er et symptom på — men også at hjertet er bedre rustet mod eventuelle ulykker.

Motionen har en dobbelt virkning. Det er vel der, man må finde årsagen til, at man tillægger den større og større betydning i kampen mod forkalkningen.

Vi ved, der er et halvt dusin faktorer, der spiller en rolle. Fødens fedt — både dets mængde og dets sammensætning — blodtrykket, nedarvet tilbøjelighed, overvægt, cigaretter, sukkersyge og altså motion. Men det ser ud, som om det sidste er det vigtigste.

I hvert fald har både masalerne, Boston-undersøgelsen på de irske brødre og andre resultater tydet på, at hvis man får motion nok, træder resten i baggrunden.

DEN sorger jo blandt andet for at holde overvægten nede — og har vel også en virkning på blodtrykket. Masalerne — som spadserede op til 100 km om dagen — havde i hvert fald ingen blodtryksforhøjelser.

Så det ser ud til, som om vi selv kan bestemme over de fleste af faktorerne — og det nedarvede spiller åbenbart en ringe rolle.

I hvert fald har jemeniter i Israel og japanere i USA fået samme kolesteroltal og samme antal blodpropper som de indfødte — skønt de ikke kendte til forkalkningen hjemme.

En fatalistisk indstilling til sagen er altså meningsløs. Det er i stor udstrækning — måske til 100 % — os selv, der bestemmer, om vi vil forkalke eller ej.

Selv den disponerende sukkersyge synes motionen nu at have en vis virkning på.

DET fortalte diabetes-forskeren Margaret Whichelow i den engelske radio forleden.

— Overvægtige har en tendens til at udvikle en mild sukkersyge, sagde hun, oftere end magre. Derfor forsøgte vi at finde metoder til at forhindre disse mennesker i at blive diabetikere, og langt den bedste metode, vi har fundet, er gennem motion.

— Selv forholdsvis moderat motion forøger musklernes optagelse af sukker tre gange — så efterhånden som flere og flere af os bliver afhængige af biler og maskiner, vil antallet af diabetestilfælde stige, fortalte Margaret Whichelow.

Så også af hensyn til den milde sukkersyge — som endda nok kun bliver opdaget i 50 pct. af tilfældene — er der grund til at finde cyklen frem.

Eller bare gå. Som masalerne. Om end knap så langt.

